Lýrin hjá Orfeus

– Nick Cave útgivið eina vánaliga dupulta plátu

"She moves among the sparrows
And she walks across the sea
She moves among the flowers
And she moves something deep indise of me (…)"
"Nature Boy"

UMMÆLI
Kim Simonsen

Nick Cave megnar ikki at halda støðið sum á gomlu plátunum. Cave ger í dag tónleik um kærleika uttan at hava nakað at siga, eftir er bert ljóðið av gomlum hjartasorgum, ið hann enn ber í barmi. Tað ljóðar sum ein klisje, men Cave er í dag alt ov eydnuríkur, hann er endaður sum ein croonari, ein annar Elvis, ið endaði við at syngja opera.

Tað er eitt kent tema innan alla list, at listafólk eru noydd at velja millum listina ella lívið. Tey, sum velja listina velja ofta kaos og genialitet, hini velja lívið og venda listini lívið. Cave hevur verið ett kaosmenniskja í meiri enn tjúgu ár, hann var í góð tjúgu ár misnýtari av heroin. Tað var hesi árini hann skrivaði teir bestu sangirnar, ið hann framførdi við bólkinum "The Bad Seeds". Nú hevur hann fingið konu, børn og er trúgvandi. Hetta er gott fyri menniskja Cave, men listamaðurin hevur minni og minni at siga. Sama søgan er galdani fyri David Bowie, ið gjørdi sínar bestu plátur í 1970inum og 1980inum, tá hann livdi eitt garvilt lív og ikki sá dagsins ljós í eini tjúgu ár.

Mr. Sadness

Hvat er ein hjartasorg uttan Nick Cavesa svørtu myrkoygdu gomlu balladur: "I Let Love In", "West Country Girl", "People Ain´t No Good", "Sad Waters", "Love Letter" og "Far From Me" - hetta eru kærleikssangir, ið byrja har sum: "gátufulli longsulin í sálini, og í kensluni at okkara lív í hugaheimi okkara er íblásturin og har harmasangurin nørist fyri kærleikssangin" hevur Cave sakt. Og víðari, at: "Kærleikssangurin er føddur inn í ein heim merktan av tí óskynsama, tí absurda, tí burturhugaða, tí melankolska, trásetta og svaka". Cave er tó viknaður í seinastuni, er for eyðnuríkur helst. Fyrra plátan "Nocturama" er ikki so góð, meðan "The Boatmans Call" enn er klassikarin.

Frá punk til blues og gospel

Fyrimyndirnar hjá Nick Cave er serliga portugisisk yrking, latínamerikanskt pathos og Gamla Testamenti. Stundum er hann erkvisin, eymur, hveppin, alskin og sárur. Næstu løtuna lammiterar, garterar hann og leikar í sum eitt svakt í symbolskum og mytiskum undirgangsbrølum. Røturnar hjá Cave er upprunaliga punktónleikurin, ið hann royndi seg við í áttatiárunum við orkestrinum The Birthday Party.

Hetta er so hin 13. plátan hjá Nick Cave sum solistur. Fá hava sum hann dugað at skriva um vakra og myrka kærleikan. Hansara privatlív er notoriskt kent. Seinastu 25 árini hevur hann livað eitt vilt og destruktivt lív. Men nú í nøkur ár hevur hann hildið seg frá narkotika. Hann er giftur, eigur børn og er róligari enn fyrr. Eitt enskt tónleikablað spáddi, at Nick Cave fór at vera hin næsti rokktónleikarin, ið endaði í grøvini. Hansara misnýtsla var so umfatandi, at bert Keith Richards úr Rolling Stones og Iggy Pop, hava verið so langt úti uttan at doyggja.

Cave er ein myrk útgáva av Bob Dylan, ein villmaður í mun til Neil Young. Av og á er hann eins originalur og Van Morrison. Hin vegin skrivar Dylan betri tekstir, Young ger betri løg og Van Morrison syngur fleiri ferðir betri enn Cave. Tom Waits er nógv betur enn Cave í nærum øllum, fyri ikki at tosa um Leonard Cohen, ið er nógv meiri originalir enn Cave, serligani sum yrkjari.

Sangir um morð, undirgang og sorg

Miðskeiðis í nítiárunum gjørdist Cave heimskendur við sínum myrku og melankolsku balladum, um farnan kærleika, longsul, deyða og sorg. Serliga: "Murder Ballads" plátan frá 1996 var eitt kommersielt frambrot fyri australska sangaran. Cave treivst tó ikki við hesum breiða fólksliga undanvindi. Næsta plátan var ikki so væl dámd á t.d. MTV, men tað kom at vera hendan, kallað *"The Boatmans Call"* frá 1997, ið skapti virðing fyri Cave sum listamanni. Her vóru vakrir sangir sum *"Lime Tree Arbor"*, *"Far from me"* og *"People Ain´t No Good"*. Eini tvey ár eftir hetta gjørdi hann eina serliga útgávu av hesum songum kallað *"The Secret Life of the Life Song"*, har hann samstundis hevði eina hugleiðing um kærleikssangin, um list, melankoli og hjartasorg. Cave hevur seinastu árini funnið okkurt serligt, ið vit sóu aftur í 2001 á plátuni: *"No More Shall We Part"*, ið meiri var ein hálovan av trúfesti og kærleikanum.

Heild ella spjaðing - líst ella lívið

At tosa um "heild" ella "spjaðing" er á ein hátt moralskt, kanska entá moralistiskt. Ónd list, svørt list, fólkamorð, fremmandagerðing, sjálvmorð, eksistensielt samanbrot hevur verið ein fastur fylgisveinur í list, ið hevur haft mín áhuga. Filmar, musikkur og alt mær dámar og fáist við fylgir hesum æstetikki. Modernað fotolist er t.d. melankolsk. Tað er ein stór tristessa í gomlum fotoalbummum, ið eingin kennist við. Hetta er momento mori. Skal eg úttala meg moralskt, metandi og vurderandi um modernismuan, er tað so, at tá hon er myrkast, vemmeligast, svartast, syrgiligast, mest spjødd og vandamikil og desperat, at hon vil siga tað sum er av størstum týðningi og er vakrast- tá elskar hon mest einstaklingin. Cave var einaferð ein partur av hesi hugmynd hjá mær, men á nýggju plártunum ljóðar Cave enn sum vit kenna hann, av og á við stillum klaverballadunum, har sjelloin og melankoliin bloðir niður eftir vegginum, men tekstirnir hava ikki sama harða, gotiska, grumma og ræðuliga lyndi yvir sær, meiri er tað sum ein tómleiki hevur yvirtikið, sum í allari symbolismu og seinromantikki. Kærleikssangirnir eru heldur ikki longur so syndarligir ella merktir av vanlukku og tí tragiska. Hesir vanta sorgarleikin, syndarligar lagnur og vanlukkustandin, ið kærleikin manar fram. Trúðfasti Cave tilhangarin vantar kanska júst hetta. Cave hevur funnið frið og er endaður við einum tryggum lívsgrundarlagi í einum kaotiskum heimi, sum ein vernd og eitt skjól móti øllum tí ósikra og ótrygga.

Bargeld er farin og Cave er keðiligur

Bólkurin "The Bad Seeds" er samansettur av fólkum sum Mick Harvey, ið er eitt slag av kapelmeistara. Hetta er fyrsta plátan har guitaristurin frá "Einstürzende Neubautens" Blixa Bargeld ikki er við meiri.

Cave hevur altíð verið ein romantisk sál, ein myrkur melankolikari og ein sonn hetja fyri allar gothic fans. Hann er ávirkaður av blues, av gospel og av tónleiki frá Suðurstatunum í USA, sum Blind Lemon Jefferson, John Lee Hooker, Johnny Cash og Elvis Presley. Sjálvandi er Cave áhugaður í at skriva seg inní tónleikasøguna undir liðini á Dylan, Cash og Cohen, men eg haldi ikki at hann hevur formatið longur.

Seinni árini haldi eg at Cave er versnaður. Síðani plátuna "Nocturama" haldi eg at hann hevur einki at skriva um. Honum vantar at vera nívdur av sorg, hann sigur beinleiðis á einum sangi, at hann hevur einki at siga: "There She Goes, My Beautiful World (…) Me, I'm lying here with nothing in my ears. Me, I'm lying here for what seems years. I'm just lying on my bed with nothing in my head. Send that stuff on down to me."

Onkrir sangir eru tó vakir, sjálvt um nærum eingin tekstur er áhugaverður. Cave syngur saman við London Community Gospel Choir, ið ger sangirnar til gospel.

Hetta er ein hin vánaligasta plátan hjá Cave. Hann hevur ikki bert einki at siga, hann hevur útgivið eina dupulta plátu av "eg havi einki at siga" sangum. Cave skuldi bíðað nøkur ár og útgivið eini tveir av hesum sangunum á einari plátu, ið taldi eini sjey sangir. Tað er eingin ivi um at Cave er í kreppu í hesum døgum.

Nick Cave: "Abbatoir Blues/The Lyre of Orpheus".

TING-HELLAN

Arafat og Palestina

– Arafat var ein stríðsmaður. Hann er helst størsta orsøkin til at Palestina hevur heimastýrið, og onkursvegna gerst eitt fullveldi. Men hann egnaði seg best til tað harða stríði, tá stríði skifti frá vápnum til orð og taktiskan politik, var styrkin ikki tann sama. Deyði Arafats kann gera, at fastlæstar støður verða royndar av nýggjum, tí nýggj fólk skulu samráðast og hava ikki læst seg fastan í diplomatiskum orðadráttum og ultimatum skrivar Bogi Eliasen, í Tinghelluanalysuni

TINGHELLUANALYSA
Bogi Eliassen

Nú fór hann, hesin skelvandi, rópandi stríðsmaðurin. Í einari tilgongd, sum allýsti bæði maktspæl og pengagreði hjá teim nærmastu, fór hesin uppreistarmaðurin, terroristurin, nobelfriðarheiðurslønarvinnarin og ikki minst milliarderurin. Alla mína tíð hevur hann verið ein av høvuðspersónunum í tí altíð kókandi Miðeystri. Av mótstøðumonnum skírdur yvirgangsmaður, av viðhaldsfólki frælsisstríðsmaður.

Vit hava seinastu nógvu árini, hoyrt og sað nógv tíðindi um Ísrael og Palestina, men hvat snýr bardagin seg veruliga um?

Søgan

Palestina var eitt bretskt hjáland til endan av 2. heimsbardaga. Millum 1. og 2. heimsbardaga gjørdist Palestina eitt sonevnt protektorat, sum uttan tíðarætlan skuldi mennast til fullveldi. Tá búðu ikki so nógvir jødar í landinum. Søgur siga, at Bretland dag um dag gjørdi óformligar avtalur við bæði palestinar og jødar, um hvør skuldi hava landið. Soleiðis stríddust báðir partar bæði við vápnum og samráðingum um at vinna sær rættin til landið. Eftir hetta var eitt stórt sirkus, sendinevndir fyri báðar partar ferðaðust kring allan knøttin fyri at vinna stuðul frá heimsins londum, fyri at fáa tey í sín part og góðkenna teirra stjórn sum tann suverena fyri táverandi Palestina, núverandi Ísrael, skuldi fáa sítt fullveldi. Ein heldur løgin partur av hesi søgu stendur nærhendis Cuzco í Peru. Har stendur ein kristusstandmynd, eftirgjørd tí í Rio, ið sigst at verða givin av kristnu palestinunum, sum vóru eina diplomatiska ferð í Peru, til tess at fáa Peru at stuðla teim at vinna landið.

Borgarakríggj var millum partarnar upp undir 2. heimsbardaga. Bretland royndi at finna eina semju, við býta landið upp í jødiskt Ísrael og Palestina. Aftaná hart trýst og yvirgang frá serliga jødunum, bað Bretland beint aftaná 2. heimsbardaga ST koma upp í leikin, sum síðan gjørdi eitt uppskot, sum minti um tað bretska. Hetta gav jødunum 56% av landinum. Henda loysnin elvdi til borgarakríggj, og kanska øll tey kríggini Ísrael hevði við grannalondini. Endin var, at Ísrael samanumtikið kom best frá øllum orrustunum.

Samvitskubit

Ein orsøk til at jødarnir fingu so góðan stuðul, var at aftaná 2, heimsbardaga lá Evropa í skeljasori, flestu lond, íbúgvar sum leiðarar, høvdu nívandi samvitskubit av jødahatrinum, týningunum og forfylgingini, ið helst var sterk langt uttan fyri tann týska aksan eisini. Helst tí var tað ein perfekt skriviborðsloysn at geva jødunum lovaða landið aftur. Soleiðis kundu evropeisku londini linna sítt samvitskubit, sleppa av við jødarnar og síggja út sum góðdør, við at geva plágaða fólkinum lovaða landið aftur. Gloymt var bara, at har búðu fólk. Endin var at jødarnir vunnu, og Ísrael sá dagsins ljós. Evropa fekk samvitskulætta, og slapp sær av við stórstu orsøkina til xenofobi, nemliga jødarnar. Onkuntið hevur ein hug at spyrja seg sjálvan, um muslimar bert eru komnir í teirra stað.

Umstøðurnar kring skapanina av tí modernaða Ísrael, lýsa væl tað altjóða politiska spælið og tað sum oftani fyriferst, dupultspælið. Øll orrustan byrjaði við tí bretska diplomatiska dupultspælinum, at gera eina avtalu við báðar partar, sum síðan hevur gjørt tað ógjørligt, at finna ein millumloysn. Millumloysnin gerst ikki lættari av, at partar av báðum þørtum hava sum høvuðsmál at leggja hin í oyði. Hetta hava við sað nærum dagliga við orðingum frá Hamas og m.a.

ortodoxum og jødiskum búsetum í palestinsku økinum.

Friður?

Men hvat nú Arafat er farin? Ymsar eru metingarnar og oftani hevur ljóðað, at m.a. USA kravdi at fáa Arafat frá, fyri at fara undir at arbeiði við eini loysn uppá henda trupulleikan. Og hví? Arafat sat helst ov leingi við valdið. Kanska var hann persónliga ímyndin av mótstøðuni, persónliga ímyndin av rættinum til at vera ein palestinentisk tjóð. Hann var stríðsmaðurin, sum fyrst við yvirgangi og síðan við politikki royndi at skapa henda grundpall. Men hann var eisini ein valdsgreðingur, sum einahelst setti líka nógvar pengar á bók, sum hann læt fara víðari til sítt egna fátæka fólk, hetta av játtanum, onnur lond góvu palestinensisku tjóðini í neyð- og menningarhjálp.

Møguliga er tað rætt, sum onkur vil vera við, at nú Arafat er burtur, er møguleiki at samráðast um eina friðaliga loysn. Men er Sharon nakað frægari enn Arafat?

Eitt er vist, tað letur nakrar møguleikar upp. Deyði Arafats letur eisini tað spælið upp at taka maktina eftir Arafat. Tí kann tað eins væl syndra tað palestinensiska sjálvstøri. Bert fyri at taka nýggjari dømir úr heimssøguni, var okkum sagt, at við at seta Talebanar frá kundi eitt demokrati setast inn; við at seta Saddam frá, skuldi verið lag á manni at fingið eina demokratiska stjórn har. Sjálvandi kemur ein ráður kampur um vald í kjalavørrinum á slíkum, og tað at Arafat doyði soleiðis, ger ikki hesa innanhýsis orrustu minni. Umframt at sundurlaga Palestina kann hetta stríðið elva til fraktiónir av yvirgangsbólkum, sum eingin kann stóra, og sum soleiðis við yvirgangi kunnu leggja eina og hvørja friðarætlan í grús. Hinvegin skulu vit minnast til, at allar friðarætlanir, sum USA er við í, verða trøstar av, at jødarnir í USA hava stóra ávirkan, tí teir bæði politiskt og fíggjarliga eru sterkir. Hetta er eitt dømi um, at uttanríkispolitikkur partvís verður stýrdur av innanlendispolitikki. Sama sæst m.a. í USA mótvegis Kuba. Fáur ivast í at Kuba fyri langari tíð síðani hevði verið eitt praktkapitalistiskt liberalparadís, um USA tók sínar forðingar av. Hetta vilja kubanarnir í útlegd í Florida ikki vita av. Teir ynskja eina harða kós og teir hava stórt vald sum valbólkur í Miami, umframt at Kuba hevur verið ein takksom fíggindamynd hjá USA at hava.

Valdsspælið

Fyri at venda aftur til Palestina, standa vit í eini støðu har eingin veit hvat henda kann. Kappingin um at taka við valdinum eftir Arafat og hvør fær valdið, er avgerðandi fyri um veruligar samráðingar verða og eftir hvørjum leisti. Samstundis er tað avgerandi, um hesin kampurin fragmenterar Palestina ella ikki. Landið liggur í einum ófriðaligum øki, har vandi javnan er fyri samanbrestum. Hinvegin so roynir ES at lata seg upp fyri samstarvi við hesi øki, gomlu italsku handilsøkini, sum verða við sonevndi upprunaavtaluni fyri Evropa og Miðalhavið, sum Føroyar eisini verða partur av í næstum.

At hyggja at Ísrael við stjórnmálaeygum er løgið. Nógv orka hevur verið lødd í at byggja upp eina perfekta valskipan, soleiðis at øll eru umboðaði. Men hetta hevur ikki hjálpt, tá t.d. prísurin fyri vatn í palestinentisku økjunum til tíðir hevur verið fleiri ferðir størri enn í jødiskum økjum. Valskipanin hevur ikki megnað at fáa jødar og palestinar at liva friðaliga saman í sátt og semju.

Tað er givið, at ein partur av orrustuni snðr seg um atgongd til vatn. Fær Palestina tey søguligu økini, gerst Ísrael illa fyri hesum viðvíkjandi. Tað er eisini givið, at týdningarmestu altjóða aktørarnir arbeiða fram ímóti at Palestina fer frá at verða eitt heimastøri til eitt fullveldi.

Ein ætlan at loysa henda trupulleikan krevur, at atlit verða tikin fyri tí standi heimastýrið Palestina er í. Ringa støðan er bæði orsakað av stríðnum við Ísrael, teim vánaligu korunum, men eisini tí umfatandi mutrinum í teirra fyrisiting. Ísrael hevur í kríggjunum, sum hava verið aftaná 2. heimsbardaga, vunnið sær landaøkir og vil ikki uttan víðari lata alt frá sær aftur. Neyvan fæst friður í lag, fyrrenn semja fæst um, hvussu palestinar fáa sín stat. Hetta krevur at ísraelittar kenna seg tryggar, og kemur ikki um víðgongdir partar av t.d. PLO halda áfram við sjálvmorðsbumbum

Støðan var eins og steðgað upp við Arafat. Søguligi møguleikin við Oslo semjuni fór, tá Rabin bleiv skotin og aftaná tað var tað eins og Arafat ikki hevði dirvi til, sum statsmaður, at seta seg út um ósemjurnar í baklandinum. Hinvegin helt hann saman um Palestina og hevur sitið so mikið leingi við valdi, at kampurin um at taka við eftir hann, kann gerast so haður, at tað skaðar Palestina álvarsliga. Og var Arafat ein yvirgangsmaður? Hann brúkti yvirgang fyri søkina Palestina. Ein dani sum bumbaði týsk tok undir 2. heimsbardaga, var hann yvirgangsmaður og var fransmaðurin sum hersetingarvaldið í sínum hersetta landi tað?

Arafat var ein stríðsmaður. Hann er helst størsta orsøkin til at Palestina hevur heimastýrið, og onkursvegna gerst eitt fullveldi. Men hann egnaði seg best til tað harða stríði, tá stríði skifti frá vápnum til orð og taktiskan politik, var styrkin ikki tann sama. Deyði Arafats kann gera, at fastlæstar støður verða royndar av nýggjum, tí nøggj fólk skulu samráðast og hava ikki læst seg fastan í diplomatiskum orðadráttum og ultimatum. Livst so spyrst.